Ár 2010, hin 14. desember

162.
10/01051 Áseting av fundardøgum 2011 - Býráðið

Uppskot er um hesar fundardagar fyri 2011:

25. januar	21. juni
22. februar	20. september
22. mars	18. oktober
26. apríl	15. november
24. mai	13. desember

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.

163.
10/01006 Sløkkiliðið – ynski um keyp í desember 2010 – *1. viðgerð*

Ein uppgerð eftir rudding av oljudálking vísir, at Sløkkiliðið fer at hava umleið 1 mió. kr. í avlopi. Sløkkiliðsleiðarin vísir á ein íløgutørv áljóðandi kr. 800.000,- Sí skriv í málinum.

Brunanevndin tekur á fundi 23. november 2010 undir við uppskotinum hjá sløkkiliðsleiðaranum vísandi til ov lítla játtan í rakstri og manglandi íløgujáttan ígjøgnum fleiri ár.

Tekniska Nevnd mælir á fundi 30. november 2010 til at játta kr. 600.000,-. Elsebeth M. Gunnleygsdóttur luttók ikki í viðgerðini av málinum, vegna ógegni.

Fíggjarnevndin tekur á fundi 8. desember 2010 undir við Brunanevndini, 23. november 2010 og Teknisku Nevnd, 30. november 2010, og at málið verður framt, tá ið peningurin er innkomin.

Býráðsins samtykt: Elsebeth M. Gunnleygsdóttur luttók ikki í viðgerðini, vegna ógegni. Tilmælið samtykt.

164.
10/00207 Mentanarhús – stovning, viðtøkur v.m.

Norðoya Mentanardepil varð settur á stovn í 2000 og gjørdi eitt fyrireikandi arbeiði fram til 2009. Í nevndarumfarinum í oktober í ár skuldi støða takast til, *um depilin skuldi avtakast, *um arbeiðið við bygging av mentanarhúsi skuldi halda fram hjá umsitingini, ella *um arbeiðið skuldi halda fram hjá stýrinum fyri sjálvsognarstovnin Spinnaríið. Mentanarnevndin mælti 6. oktober 2010 til, at grunnurin varð lagdur í ein og sama grunn "Grunnurin Mentanarhús í Klaksvík", og hesum tók Fíggjarnevndin undir við 13. okt. 2010

Málið hevur verið til kunning í Mentanarnevndini 1. des. 2010.

Vísandi til samtyktirnar í Mentanarnevndini 6. okt. 2010 og Fíggjarnevndini 13. oktober 2010, beinir Fíggjarnevndin á fundi 8. desember 2010 tær dagførdu samtyktirnar fyri "Grunnin Mentanarhús í Klaksvík" í býráðið til samtyktar.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt.